HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Akademikari

Søkt verður eftir starvsfólki við akademiskari útbúgving til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið kemur serliga at umfata mál innan karmarnar av havumhvørvislógini, serliga sæð í ljósinum av eini komandi oljuleiting við Føroyar.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga serliga kemur at arbeiða við:

- gera uppskot til reglur/kunngerðir á økinum.
- verða við til at seta umhvørvisligar treytir til feløg sum fáa licens á føroyskum øki.
- fakliga meta um umhvørvisfrágreiðingar frá oljufeløgunum, áðrenn tey fara undir virksemi undir Føroyum.
- fylgja altjóða rákinum innan havumhvørvisøkið.

Starvið, sum er nýtt, er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Tú fært møguleikan at menna teg til avbjóðingarnar, bæði innanhýsis og við skeiðum og vitjanum uttanlanda. Afturat hesum kemur møguleikin at luttaka í verkætlanum av ymiskum slag innan hetta økið.

Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan náttúruvísund ella verkfrøði. Tey, sum hava hollar praktiskar royndir hava fyrimun.

Tú kemur saman at leiðsluni at leggja tína egnu menning til rættis og tú skal kunna tola broytingar í starvsinnihaldinum. Væntast kann, at ein partur av arbeiðinum kemur at ganga fyri seg uttanlanda.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV o.t. skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 14. januar 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra ella Jákup Paula Joensen, deildarleiðara.

Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo

*Lýsið í* **sosialinum**

# Kunngerð

*um elprísir v.m.*

Gjørt verður kunnugt, at gjaldskráin hjá SEV frá 1. januar ár 2000 uttan MVG er hendan fyri hvørja elinnlegging:

| Ársnýtsla: | Fast gjald: | Prísur kr./kWh: |
|---|---|---|
| 0– 10.000 kWh | 480 kr./ár | 1,11 |
| 10.000–100.000 kWh | 1.280 kr./ár | 1,03 |
| yvir–100.000 kWh | 5.280 kr./ár | 0,99 |

Undantikið tá streymveitingin er slitin vegna brek á innleggingini, eftirstøðu ella av aðrari orsøk, har málarin ikki verður niðurtikin, verður fasta gjaldið bert kravt fyri tíðina, innleggingin er íbundin hjá SEV.
Innleggingar, ið ikki verða nýttar, men enn ikki eru uppsagdar, skulu gjalda fast gjald, sum eigarin ber ábyrgd av.

**Ídnaður, landbúnaður, fiskivinna og fiskaaling.**
Serstøk gjaldskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edvtænastur. Gjaldsskráin uttan MVG fyri nevndu vinnur er hendan fyri hvørja innlegging:

| Ársnýtsla: | Fast gjald: | Prísur kr./kWh: |
|---|---|---|
| 0–10.000 kWh | 480 kr./ár | 1,11 |
| 10.000–20.000 kWh | 1.280 kr./ár | 1,03 |
| yvir–20.000 kWh | 8.480 kr./ár | 0,67 |

Neyvari upplýsingar um, hvørjar vinnugreinar koma undir hesa gjaldskrá, fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

**Ymisk ómaksgjøld v.m.**
Verða gjøld ikki goldin rættstundis sambært rokning/giroinngjaldskort, verða fyri hvørjar byrjaðar 100 kr. av rokningsupphæddini lagdar kr. 1,00 afturat rokningini hvønn byrjaðan mánað, til falna skuldin er goldin. Harafturat skulu gjaldast kr. 15,00 fyri hvørja áminning.
Tá neyðugt er at taka stig til at slíta streymveitingina vegna eftirstøðu, skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi.
Fyri íbinding aftaná slíting vegan eftirstøðu skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi. Um íbundið verður uttanfyri vanliga arbeiðstíð eftir áheitan frá eigara/brúkara, verður ómaksgjaldi kr. 300,00.
Málarin kann verða kannaður, tá biðið verður um tað.
Um málarin er í lagi, verða kr. 200,00 kravdar í ómaksgjaldi.

**Flyting**
Tá flutt verður, skal málarin lesast av, og SEV skal hava fráboðan um avlesturin. Tann, sum flytur, hevur skyldu at gjalda, til málarin er avlisin.

**Fyribils streymveiting**
Tá fyribils streymveiting verður veitt til byggipláss, stuttleikaøki o.a., eru hesir prísir galdandi:

**Fast gjald:** Eftir vanligu gjaldsskránni.
**Elorkugjald:** 10% afturat prísinum eftir vanligu gjaldsskránni.
**Trygd:** Kann verða kravd.

Allar útreiðslur í sambandi við fyribils streymveiting, so sum styrking av neti ella víðkan, verða goldnar frammanundan eftir rokning.

**MVG**
Afturat omanfyri nevndu gjøldum verður roknað MVG.

**Annað**
Gjørt verður vart við, at í gjaldskránni eru eisini serstakar reglur galdandi fyri íbindingargjøld og ískoyti til ávísar innføringarkaðalar.
Gjaldskráin kann fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

**Tórshavnm tann 31. desember 1999.**

Elfelagið SEV

MARCO POLO

søkir eftir
SERVITRISU m/k
Áhuga›i kunnu venda sær til
Tel. 213430

MARCO POLO
Smoga 1140 • FO 110 Tórshavn
Tel. 313430 • Fax. 313220

# FK í Fuglafirði

Vit sóknast eftir fólki til vanligt handilsarbeiði heilan dag at byrja 1. februar. Skrivlig umsókn.

**FK Fuglafjørður**
**Boks 84**

**www.wenzel.fo**

Sig…
So
Si
al
ur
in

www.sosialurin.fo

**Vi›víkjandi P/F 644, P/F Faroe Shellfish í likvidatión**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya vi› hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mána›ar frá í dag at uppl‡sa um felagi› enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, ver›ur felagi› strika› úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 03. januar 2000

Kristin Balle



Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Sjónráðgevi

***Starvið***
Eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv sum sjónráðgevi er við hesum lýst leyst at søkja. Starvið, ið er skipað í skúlapsykologisku og sernámsfrøðiligu kanningar- og ráðgevingardeildini í Sernámsdeplinum, er eitt hálvtíðarstarv.

Høvuðsuppgávurnar eru m.a. at:
- Kanna, ráðgeva og leiðbeina í sambandi við sjónbrek.
- Fyrireika og samskipa tiltøk við atliti at sjónbrekum.
- Verða sjónbrekaðum og avvarðandi teirra, skúlum og starvsfólkum í Sernámsdeplinum til hjálpar í øllum málum, har talan er um ella kann verða um sjónbrek.
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til Sernámsdepilin í sambandi við sjónbrek, og avgreiða mál hesum viðvíkjandi.

***Førleikakrøv***
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur:
- Útbúgving til tess at røkja sjónráðgevauppgávur.
- Hollan kunnleika til sernámsfrøðiligt virksemi.
- Hollan málkunnleika, serliga í føroyskum máli.
- Góð samstarvsevni.
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

***Vit bjóða***
Eitt spennandi starv við nógvum samskifti bæði innan- og uttanhýsis. Eitt sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning. Eitt starv, har tú kemur at arbeiða í einum spennandi og fakliga sterkum umhvørvi við skiftandi uppgávum við atliti at sjónbreki.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag við byrjanarløn í 30. lønarflokki, sum eftir 6 ára starvstíð verður lønt í 32. lønarflokki á 2. stigi.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send:

Sernámsdeplinum
Postrúm 2036
FO-160 Tórshavn

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000 kl. 15.00.

Starvið verður sett skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Maritu Petersen í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

*__Undirvísingar- og Mentamálstýrið__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*__Í Sernámsdeplinum__ er: Skúlaspykologisk- og sernámsfrøðilig ráðgeving fyri alt skúlaverkið, skúli við næmingaheimi, smábarnadeild við eygleiðing og talibólkum, talideild, hoyritólamiðstøð og hugskots- og leikasavn.*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2943

**Navn:** Sp/f C.C.
**Adressa:** 410 Kollafjør›ur

**Kommuna:** Kollafjar›ar Kommuna
**Stovningardato:** 25.11.1999
**Vi›tøkudato:** 25.11.1999
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Christian Christiansen, 410 Kollafjør›ur.
**Stjórn:** Christian Christiansen, 410 Kollafjør›ur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 25.11.1999 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka virksemi vi› handli, tænastu, íløgum og ø›rum virksemi, sum stendur í sambandi vi› hetta.

Skráseting Føroya tann 30. desember 1999

Kristin Balle



»Gult ljós«

Nýtt skeið byrjar
6. januar

**Tvøroyra Teori- & Koyriskúli**
v/Áka Dimon
Tlf. 371180 & 286093
Koyrikort til persónbil & motorsúkklu

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2945

**Navn:** P/F Kaldbaks Seafood
**Adressa:** R.C. Effersøesgøta 22, Boks 1006, 110 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 16.12.1999
**Vi›tøkudato:** 16.12.1999
**Kapitalur:** Kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 220.
**Stovnarar:** Brdr. Schlie's Fiskeeksport A/S, Hirtshals, Danmark og P/F Farex, Tórshavn.
**Nevnd:** Kaj Johan Schlie, Søren Toftsvej 22, DK-9850 Hirtshals (forma›ur), Jens Christian Schlie, Kæreng 6, DK-9850 Hirtshals, Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir og Kári Danielsen, Korkagøta 10, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Kaj Leo Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av allari nevndini í felag.
**Grannsko›ari:** : Grannsko›arafelagi› Sp/f Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 16.12.1999 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er keyp og søla av fiski, umframt vi›ger› og gó›sking í samband vi› hetta.

Skráseting Føroya tann 29. desember 1999

Kristin Balle

*Halt* **sosialin**

# Arbeiðseftirlitið

Fyri rætta fólkið er á Arbeiðseftirlitinum eitt sera áhugavert og spennandi starv

## í undirvísing og kunning

innan arbeiðsumhvørvi og alt, ið hertil hoyrir, leyst at søkja til setan sum skjótast.

- **Arbeiðsuppgávurnar** koma at fevna um alt okkara kunningar- og skeiðvirksemi og kann her nevnast trygdarskeið fyri fólk í trygdarskipanum á virkjum, temadagar og um førleikaskeið fyri trukk- og kranførarar v.m. Eisini verður talan um at kunna og leiðbeina virkir um galdandi lóggávu innan arbeiðsumhvørvi. Umframt at standa fyri útgávuni av okkara kunningarblaði »Trygd & Trivni«, kemur viðkomandi eisini at umsita okkara EDV-kervi.
- **Rætti umsøkjarin** við royndum innan undirvísing og frálæru, tøkniligum førleika, við góðum evnum til at málbera seg skrivliga og munnliga á føroyskum og við teldukunnleika í NT-stýrisskipanini og Microsoft forritum (Word, Excel, Access, Power Point v.m.) hevur fyrimun.
- **Setanartreytir.** Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Landsstýrið og viðkomandi yrkisfelag.
- **Upplýsing og umsókn.** Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eli Davidsen, tlf. 317811. Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Skrivlig umsøkn við avriti av prógvi og møguligum ummælum skal, áðrenn 15. januar 2000, sendast til:

**Arbeiðseftirlitið**
**P.O. Boks 1134**
**FO-110 Tórshavn**

**Vi›víkjandi P/F 730, P/F Kropsvenjing í likvidatión**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya vi› hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mána›ar frá í dag at uppl‡sa um felagi› enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, ver›ur felagi› strika› úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 03. januar 2000

Kristin Balle

**Vi›víkjandi P/F 776, P/F Dánjal Pauli Lervigs Eftf. í likvidatión**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya vi› hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mána›ar frá í dag at uppl‡sa um felagi› enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, ver›ur felagi› strika› úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 03. januar 2000

Kristin Balle